# Eg siti mangan sum á nálum

**– Tann, sum koyrir lastbil í Suðuroy skal hava tunguna mitt í munninum og tunnilin, sum Landsverkfrøðingurin ætlar at gera ímillum Øravík og Hov, er ikki til nakra nyttu, sigur Tórður Holm**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*

– Hatta kunnu teir akkurrát tað sama spara sær.

Tórður Holm, sum koyrir treylara í Suðuroy, ivast ikki, tá ið hann skal meta um ætlanina at gera tunnil ímillum Øravík og Hov.

Hann sigur, at verður tunnilin lagdur soleiðis sum Landsverkfrøðingurin hevur skotið upp, kunnu teir akkurat tað sama spara sær at gera tunnil yvirhøvur.

Og Tórður Holm átti at vita, hvat hann tosar um.

Hann hevur í fleiri ár koyrt treylara fyri Richard B. Thomsen á Tvøroyri og tað munnu vera fá. ið koyra so ofta eftir Hovsvegnum sum hann.

- Eg koyri javnt ímillum 1.000 og 1.400 kilometrar um vikuna og tað allarmesta er eftir hovsvegnum ímillum Tvøroyri og Vág

Tað eru eini 25-27 kilometrar ímillum Tvøroyri og Vág, so við einum sindri av høvuðrokning er skjótt at koma fram til, at tað verða nakrir túrar tilsamans.



*- Tað er mangan við hjartanum í hálsinum, at vit koyra eftir Hovsvegnum. Men verður tunnilin ímillum Øravík og Hov lagdur sum Landsverkfrøðingurin ætlar, sleppa vit ikki undan tí ringasta strekkinum og tá er tað nyttuleyst, sigur Tórður Holm, sum koyrir hetta strekkið fleiri ferðir um dagin*

*Mynd: Leivur Nygaard*

### Situr mangan sum á nálum

Og hann dylir heldur ikki fyri, at tað er mangan, hann situr á nálum, tá ið hann koyrir

- Eitt er, at Hovsvegurin er smalur. Men tað ringasta strekkið er í veruleikanum vegurin úr Hovi niðan á Milliónsvingið, vit rópa.

Hann sigur, at tann brekkan er brøtt við krappum svingi í.

- Tá ið vit koyra niðaneftir, noyðast vit at kalla at steðga helt, fyri at koma um svingið og tað er ómetaliga tungt at koma uppaftur.

Koyra vit omaneftir, er eisini neyðugt at steðga fyri at koma um svingið.

Hann sigur, at um summarið gongur tað.

– Men um veturin er mangan ikki lukkuligt. Av tí, at brekkan er so brøtt niðaneftir, fæst ikki ferð á bilin og tá skal onki til, at hann hann fer at spola og glíður eftir reyv. Tá ið tú hinvegin koyrir oamneftir aftur, er mangan ómetaliga trupult at bremsa fyri at steðga.

- Sostatt er hetta tað ringasta strekkið av øllum á vegnum ímillum norðaru- og syðru helvt í Suðuroy, tí hóast allur Hovsvegurin er ógvuliga smalur, er tað ongastaðni, at tað er so bratt eitt so langt strekkið, eftir eitt sving, sum er næstan 180 stig.

Hetta eru allur suðuroyingar, sum koyra lastbil, samdur um!

Hann sigur, at tað er ofta, at teir prísa seg lukkuligar yvir, at tey, sum koyra persónbil, eru so lagalig.

- Tey, sum koyra persónbil í Suðuroy, eru avbera lagalig. Tað er so ofta at vit koma koyrandi eftir hesi brekkuni um veturin, at vit fáa illa steðga. Og møta vit so einum persónbili, noyðast vit at geva tekin til tey, so at tey fáa givið seg til síðis.

Soleiðis gongur tað fyri seg hjá okkum, sum koyra lastbil og tað er mangan, at vit sita við hjartanum í hálsinum.

Og hann sigur, at tað er vert at geva gætur, at verður tunnilin lagdur, soleiðis sum Landsverkfrøðingurin hevur skotið upp, slepst ikki undan hesum vegastrekkinum.

- Hóast vegurin verður breiðkaður, verður brekkan og svingini tey somu og tað er har, trupulleikin liggur, sigur Tórður Holm.

Hann ivast tí ikki í, at loysnin, sum NCC hevur skotið upp er tann einasta rætta.

Umframt at vera nógv tann besta loysnin, førir hetta uppskotið við sær, at tað slepst undan kavaruddingá einum longum fjallavegi og tað telur eisini við.

# Nýggi tunnilin ímillum Øravík og Hov er ein nógv betri loysn

**Tað er ongin ivi um, at fyri ferðsluna, er tunnilin, sum NCC hevur skotið upp at gera ímillum Øravík og Hov, nógv betri enn tann, sum Landsverkfrøðingurin hættar sær í holt við, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslu**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum ætlar at taka tilboðið frá NCC um tunnil ímillum Øravík og Hov í fullum álvara.

Tað hevur hann gjørt greitt fyri øllum Føroya Løgtingi.

Á løgtingsfundinum mikudagin, segði hann, at hann hevði biðið Landsverkfrøðingin kanna uppskotið hjá CNN.

Annars var ætlanin at leggja verklagslóg fyri Løgtingið í vár um Hovstunnilin. Samstundis var ætlanin at flyta útgerðina, sum varð brúkt í gásadalsbergholinum til Suðuroyar, so at farast kundi undir arbeiðið í heyst.

Á fíggjarlógini í ár eru sjey milliónir settar av til Hovstunnilin.

Men nú eru nýggir upplýsingar komnir fram í málinum og tí hevur landsstýrismaðurin gjørt av at bíða, so at stundir gevast at kanna allar møguleikar. Og sostatt verður tað neyvan fyrrenn seint í summar, ella í heyst, at uppskot um verklagslóg kann leggjast fyri tingið, greiddi Bjarni Djurholm Løgtinginum frá.

Hann sigur, at tá ið Landsverkfrøðingurin legði tunnilin, mátti hann laga linjuføringina eftir jarðfrøðiligu viðurskiftunum.

Tað noyðist Landsverkfrøðingurin at gera, tí hann hevur ikki so framkomna útgerð, sum NCC og tí mugu teir velja tað tryggu loysnina, hóast tað ikki er tann besta loysnin fyri ferðsluna.

Men nú eitt annað uppskot er lagt fram, hevur Bjarni Djurholm biðið Landsverkfrøðingin kanna allar møguleikar og Landsverkfrøðingurin hevur biðið ein norskan serfrøðing meta um uppskotið hjá NCC og tað arbeiðið fer fram í løtuni, men fyribils hevur landsverkfrøðingurin svarað, at hann heldur at uppskotið hjá NCC er áhugavert.

Og fyrrenn allir møguleikar eru kannaðir, verður onki gjørt. Og landsstýrismaðurin legði afturat, at tá ið støða verður tikin í málinum, verður tað gjørt í samráð við allar partar í málinum og hann ætlar eisini at halda fund við løgtingsmenninar úr Suðuroy um málið.

Men hann tekur eisini undir við uppskotinum hjá Jóannes Eidesgaard um at halda kunnandi fund fyri almenninginum í Suðurouy um verkætlanina, tá ið málið er búgvið til tað.



*Skal uppskotið hjá NCC fylgjast, verður neyðugt at endurskoða alla útbygginga rætlanina hjá landsstýrinum. Men ein onnur loysn er at stovna eitt partafelag, sum skal gera tunnilin á sama hátt sum Vágatunnilin, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum*

Í nýggja uppskotinum hjá NCC er tunnilin lagdur eftir, hvussu hann liggur best fyri ferðsluna.

- Við teirri útgerð, Landsverkfrøðingurin hevur, hættar hann sær ikki at gera tunnilin í láglendinum, har NCC bjóðar sær at gera hann, hóast ongin ivi er um, heldur ikki hjá Landsverkfrøðinginum, um, at hetta er tann besta loysnin fyri ferðsluna. Tað kemst av, at í láglendinum er jarðfrøðin meiri ivingarsom.

Men NCC sigur, at við teirri framkomnu útgerð, felagið hevur, hevur jarðfrøðin nógv minni týdning.

Hinvgin er Bjarni Djurholm als ikki samdur í, at tunnilin hjá Landsverkfrøðinginum verður nyttuleysur, tí í framtíðini er ætlanin at leggja vegin í ein stóran boga inn í dalin og binda í aftur longri niðri. Tað gevur ein fínan veg, har hallið er undir 40 promillu. Hallið í Vágatunlinum er 69 promillu.

Syðrumegin er tunnilin í 140 metra hædd og tað er sum tey hægstu húsini í Havn. Norðskálatunnilin er slakar 200 metrar uppi, so 140 metrar eru til at liva við.

### Útbyggingarætlanin endurskoðast

Bjarni Djurholm Men Djurholm vísir eisini á, at skal Landsverkfrøðingurin ikki gera arbeiðið, verður tað boðið út og so kann NCC bjóða á jøvnum føti við onnur.

Men so fer tað at krevja at játtanin til arbeiðið fer at vera nógv størri tey næstu árini enn tað, sum ætlanin var at seta av á langtíðarútbyggingarætlanini hjá landsstýrinum.

Hann sigur, at eftir skipanini, skal ein játtan skal fella, tá ið arbeiðið verður gjørt.

Tað fer so at føra við sær, at tað verður neyðugt at endurskoða alla útbyggingarætlanina, sum hon er. Skal tunnilin bjóðast út, verður sostatt neyðugt at føra munandi fleiri upphæddir til tunnilin í 2004 og 2005, enn ætlanin var eftir útbyggingarætlanini.

Avleiðingin av tí kann verða, at tað verður neyðugt at skarva av onkra aðrastaðni og politiskt kann tað verða trupult, tí so kemur onkur at missa.

Men tað eru eisini aðrir møguleikar. Ein av teimum er til at leggja tunnilin í eitt partafelag, so at landið bindur seg til at avdraga tunnilin yvir nøkur ár.

Bjarni Djurholm sigur, at sjálvur hevur hann áður nevnt møguleikan at bjóða tunnilin út. Men tað hevur politisk undirtøka ikki verið fyri og tí er tað blivið so, at Landsverkfrøðingurin skuldi gera hann. Og hann hevur ongantíð fingið ábendingar frá løgtinginum um annað enn at Landsverkfrøðingurin skuldi gera arbeiðið og tí eru ongar aðrar loysnir umhugsaðar.

## Í Stuttum

Landsverkfrøðingurin ætlar at gera ein tunnil í hæddini. Tunnilin verður 2100 metrar langur í einums stórum boga, men so skulu 4,2 kilometrar av vegi gerast afturat.

Kostnaður: Umleið 125 milliónir

NCC bjóðar sær til at gera ein tunnil í láglendinum. Tunnilin verður 2.500 metrar langur og snórabeinur og vegurin, sum skal gerast, verður 200 metrar.

Kostnaður: 92 milliónir, umframt mvg, útfrá teimum upplýsingum, NCC hevur nú.

Byggitíð: 20 mánaðir.



# Føroya Banki heldur kósina



*Mynd: Jørn Astrup Hansen og Føroya Banki kunnu fyri 2002 geva sínum partaeigarum, sum í høvuðsheitum er Føroya landsstýri, 73 milliónir í vinningsbýt. Bankin hevði eitt gott ár í 2002*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

**Góða gongdin hjá Føroya Banka heldur fram. Mest gevandi fyritøkan í Føroyum heldur fast við kósina, sum verpa gullegg í landskassan. Eitt tap í rentuinntøkum gjørdi árið eitt sindur slakari enn undanfarna ár, men burðurin er framvegis góður**

ROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*

– Vit rokna ikki við, at fáa eitt eins gott úrslit fyri 2002, men tað verður væntandi framvegis eitt gott úrslit, og vit kunnu siga, at tað stendur væl til hjá okkum, segði Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, tá roknskapurin fyri 2001 varð almannakunngjørdur.

Og rætt hevði hann. 2002 gjørdist eitt sindur slakari hjá Føroya Banka enn 2001, sum var besti árið nakrantíð hjá bankanum.

Árið skat gjørdist yvirskotið 182 mió. og eftir skatt vóru 146 mió. eftir hjá bankanum.

Tá ársroknskapurin fyri 2001 varð almannakunngjørdur fegnaðist leiðslan í bankanum serliga um, at talan nú var um reelt yvirskot, tí afturføringarnar frá kreppuloysnini fyrst í nítiárunum vóru endaður.

Sæð í tí ljósinum heldur góða gongdin fram, hóast yvirskotið minkaði við trettan prosentum.

Orsøkina til fallið í yvirskoti skyldast eitt tap í nettorentuinntøkuni hjá bankanum. Hetta er ein avleiðing av fallandi rentustøðinum. Hetta eru umstøðurnar, Føroya Banki lítið og einki fær gjørt við. Hevði rentustøðin hildið sær ella voksið, so hevði yvirskotið verið tilsvarandi ella hægri enn í 2001.

### Góð tøl

Hyggja vit eftir tølunum, fjølmiðlarnir hava fingið upplýst, so er roknskapurin hjá Føroya Banka nógv merktur av búskaparligu góðu samfelagsgongdini.

Hóast fleiri búskaparfrøðingar hava víst á ein vanda fyri ovurupphiting, so er lítið at taka seg aftur í, at gongdin smittar av á peningastovnarnar. Tað er so heldur ikki av tilvild, at Føroya Banki var mest gevandi fyritøkan í Føroyum í 2001, og bankin verður tað mestur eisini fyri 2002 við hesum yvirskotinum.

Útfrá lyklatølunum kunnu vit lesa nøkur minus og nøkur pluss.

Fallið í rentuinntøkum er eitt minus, og øktu rakstrarútreiðslurnar áljóðandi átta milliónir krónur eitt annað lítið misprýði. Rakstarútreiðslurnar vuksu meira enn rakstarinntøkurnar, soleiðis at inntøkan fyri hvørja útreiðslukrónur var eitt sindur minni fyri 2002 í mun til 2001. Fyri 2002 var hetta talið tað mesta í Kongaríkinum fyri peningastovnar.

Tap og burturleggingar fyri skuldarar ávirka roknskapin positivt við 1,4 mió.

Av teimum 182 mió. í rakstraryvirskoti eru 36 mió. goldnar í skatti, og 73 milliónir – helvtin av ársúrslitinum – verða goldnar í vinningsbýti, sum so at siga alt endar í landskassanum.

Í tí stóra heili var úrslitið hjá Føroya Banka líkt tí undanfarna ár, og góða gongdin heldur fram við ávísum smærri broytingum. Innlánini minkaðu fyri næstan trimum prosentum, men útlánini vuksu við hálvumøðrum. Eginpeningurin hjá bankanum er nú 1.492 mió. Sostatt skuldi virðið á bankanum ligið har á leið ella hægri.

## Fakta

### Føroya Banki í 2002

| | |
|---|---|
| Úrslit undan skatti | 182 mió. |
| Ársúrslit | 146 mió. |
| Útlán | 3,414 mia. |
| Innlán | 3,832 mia. |
| Eginpeningur | 1,492 mia. |
| Renting av eginpeningi | 12,8 % |
| Útgoldið vinningsbýti | 73 mió. |

# Norðurlendskir talvdagar í Føroyum

**Árliga norðurlandameistarakappingin fyri juniorar verður hildin um vikuskiftið í Norðurlandahúsinum. Føroyingar rokna í ár við bæði gull og silvuri**

TALV
*Heri á Rógvi*

Hetta vikuskiftið er Norðurlandahúsið í Føroyum karmur um norðurlandameistarakapping fyri juniorar í talvi. Teir flestu av teimum bestu ungdómstelvarunum í Norðanlondum luttaka í kappingini.

Kappast verður í fimm aldursbólkum, og hvørt land hevur tveir luttakarar í hvørjum bólki, soleiðis at hálvtrýss luttakarar eru við kappingini – tíggju frá hvørjum landi.

### Ein heiður

Formaðurin í talvsambandi Føroya, Rani Nolsøe, segði við setanina av kappingini, at tað er ein stórur heiður fyri Talvsambandið at sleppa at fyriskipa eina tílíka kapping.

– Karmarnir í Norðurlandahúsinum eru nakrir av teimum bestu, ein kann ynskja sær til eina tílíka kapping. Eg havi sjálvur verið til nógvar kappingar uttanlands, og karmarnir í Norðurlandahúsinum eru millum teir bestu, eg havi upplivað, sigur Rani Nolsøe.

Tað er í samtarvi við Nordisk Skakunion, at kappingin verður fyriskipað. Kappingin gongur upp á skift millum londin, og seinast kappingin var í Føroyum var í 1997.

Kostnaðurin at fyriskipa eina tílíka kapping er áleið 140.000 kr. Spælararnir fáa nakrar smáar virðislønir, men tað er serliga í sambandi við fluttning, at pengar skulu til.

– Vit hava verið so hepnir at fáa fleiri góðar stuðlar í vinnulívinum og frá Tórshavnar kommunu. Saman við tí góða samstarvsviljanum og stuðlinum frá Norðurlandahúsinum letur tað seg gera at skipa fyri einari tílíkari kapping í Føroyum, sigur Rani Nolsøe.

### Gull og silvur

Tað er ikki bert fyri Talvsambandið, at kappingin hevur týdning. Tað er ikki minst fyri leikararnar.

– Tað hevur ótrúligan stóran týdning fyri spælararnar – sum avbjóðing og uppliving. Eins og áður, so royna vit at gera ein talvskúla, meðan kappingin er, har leikarar kunnu fáa vegleiðing og konsentrera seg hundrað prosent um telvingina, sigur Rani Nolsøe.

Jacob Aagaard, International Mesto, er royndur venjari, sum til dagligt ikki fæst við annað enn talv. Hann hevur vant nakrar av føroysku leikarunum upp til kappingini.

Bæði hann og hini í fyrireikingarbólkinum hjá Talvsambandi Føroya hava góðar vónir til, at í hesari kappingini fer at enda við bæði gull og silvuri til føroyskar telvarar.

– Eg vil ikki siga, at teir eru favorittar, men teir hava góðar møguleikar at gera seg galdandi, sigur Jacob Aagaard.

Tað eru serliga eldru telvararnir, Martin Poulsen, føroyameistarin Hans Kristian Simonsen og Olaf Berg, ið hava møguleika at skara framúr. Føroyar hava í alt vunnið fimm bronsuheiðursmerki við hetta høvi áður, men einki tyngri metal.

Meðan Jacob Aagaard serliga hevur vant við hesum trimum leikarunum, so hava allir føroysku luttakararnir intenst fyrireika seg ta seinastu vikuna.

Telvararnir úr Føroyum vórðu tiknir út eftir úttøkukappingar, sum vórðu hildnar herfyri.



*Í stóra salinum í Norðurlandahúsinum sita um vikuskifti hálvtrýss ungir telvarar úr Norðanlondum og kýta seg í royndum at gerast bestir í Norðanlondum. Fremst á myndini er tað ein av bestu telvarunum í Føroyum – Martin Poulsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*